# Gera barnagarð og vøggustovu í Vági

**Næsta ár ferð Vágs Býráð at skipa bøggustovu og barnagarðí Vági**



*Tað er stórur tørvur av vøggustovu og barnagarði íVági og tað fer kommunan at gera nakaðvið næsta ár*

BARNAANSING
*Áki Bertholdsen*

**Vágur:** Næsta ár fer Vágs Býráð at gera vøggustovu og barnagarð í Vági.

Tað samtykti býráðið einmælt, nú fíggjarlógin varð endaliga samtykt í farnu viku.

Í hesum sambandi hevur Býráðið gjørt av at seta 1,1 millión av til barnaansing, har eitt sindur fer til frítíðarskúlan, men tað allarmesta fer til vøggustovuna og barnagarðin.

Hetta kemur afturat teimum 3,8 milliónunum, ið eru settar av til dagrøktina.

Á Býráðsfundinum upplýsti borgarstjórin Jógvan Krosslá, at stórur tørvur er á vøggustovu og barnagarði í Vági.

Kommunan hevur fingið fleiri áheitanir um at skipa vøggustovu og barnagarð og hann hevði eisini fingið at vita, at fólk í bygdini fóru í ferð við at savna inn undirskriftir til Býráðið við áheitan um at skipa vøggustovu og barnagarð.

Hóast dagrøktin er, riggar tað ikki so væl, at aldursspjaðingin er so stór hjá dagrøktarunum, tí áhugamálini hjá stórum og lítlum børnum eru so heilt ymisk, at tað ber illa til hjá tí einstaka dagrøktaranum at geva øllum eitt fullgott tilboð.

Tí hevur Býráðið samtykt at skipa vøggustovu og barnagarð. Í fyrstu syftu er ætlanin at gera pláss til 20 børn.

Ætlanin er í fyrstu syftu at leiga høli til vøggustovu og barnagarð og onkur høli eru í kikaranum.

Men sum frálíður, tá ið fíggjarligu umstøðurnar í Vági batnað, er ætlanin at byggja á einum stykki, sum kommunan eigur Yviri við Kráir.

# Blokadan stendur við

**Lærarafelagið kennir onki til nakra semju um savnsrøkt á skúlum og tí stendur blokadan við**

SAVNSRØKT
*Áki Bertholdsen*

Føroya Lærarafelag kennir onki til nakra semju ímillum Mentamálaráðið og Føroya Kommunufelag um savnsrøkt á skúlunum í teimum skúlunum í kommununum í Kommunufelagnum.

Tað sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

Hon sigur, at sostatt stendur blokadan ímóti skúlunum í kommununum í Føroya Kommunufelag við. Hon sigur, at tað er Lærarafelagið, sum skal góðkenna eina avtalu um savnsrøktina og tað er Lærarafelagið, sum skal taka blokaduna av.

–Vit kenna onki til nakra semju og enn minni hava vit góðtikið nakra semju . Tessvegna fara vit heldur ikki at taka blokaduna av, sigur Elsa Birgitta Petersen. Sostatt broytir semjan ímillum Føroya Kommunufelag og Mentamálaráðið als onki, leggur hon afturat. Í øllum førum verður ongin blokada tikin av, fyrrenn Lærarafelagið er kunnað um semjuna og góðtekur hana.

Men samstundis leggur hon dent á ,at ongin lærari røkir søvn, uttan hann fær løn sambært semjuni um savnssamskipara.

– Hetta er semjan, sum kommunurnar í Kommunusamskipan Føroya halda seg til, og hetta er eisini kravið til kommunurnar í Føroya Kommunufelag, sigur Elsa Birgitta Petersen. Eftir semjuni ímillum Føroya Kommunufelag og Mentamálaráðið skal Mentamálaráðið betala lærarunum løn fyri tann námsfrøðiliga partin.

Hinvegin skulu kommunurnar og skúlaleiðslurnar gera avtalu um tann røktarliga partin. Sostatt kunnu kommunurnar ikki áleggjast at betala nakað og tað, sum skal betalast, skal betalast í samráði í millum kommunurnar og skúlaleiðslurnar.

*Fyrrenn vit hava góðtikið semjuna, verður ongin blokada tikin av, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag*



# Vágbingar hægri skatt komandi ár

**Eitt samt Býráð í Vági hevur samtykt at hækka skattin næsta ár. Samstundis verður farið undir útbyggingar fyri at gera tað liviligari hjá vinnulívi og húskum**



*Vágs Býráð hevur einmælt samtykt at hækka skattin komandi ár, so at farast kann undir nakrar útbyggingar, sum eru alneyðugar fyri at varðveita tað vinnulív, sum er á fjørðinum, tí í løtuni er tað óliviligt hjá vinnulívinum*

ÚTBYGGINGAR
*Áki Bertholdsen*

**Vágur:** Næsta ár verða vágbingar noyddir at gjalda meiri skatt, enn teir gjalda nú.

Tað er greitt eftir at Vágs Býráð einmælt hevur samtykt fíggjarætlanin a fyri komandi ár.

Jógvan Krosslá, borgarstjóri, sigur, at tað er við ringum tannabiti, at kommunuskattaprosentið verður sett upp.

Men kommunan verður noydd til at fara undir ymsar útbyggingar, sum kosta rættiliga nógv og tí slepst ikki undan at hækka skattaprosentið.

Í ár betala vágbingar 21,75% í kommunuskatti, men næsta ár verður kommunuskatturin 22,5%. Kommunuskatturin hækkar sostatt 0,75%.

Hinvegin verður barnafrádrátturin óbroyttur, 2.500 krónur.

Orsøkin til, at skattaprosentið fer upp, er, at næsta ár noyðist kommunan undir eina havnaútbygging, sum kostar nógvan pening. Harafturat fer Býráðið at gera vøggustovu og barnagarð í Vági.

Tilsamans fer kommunan at byggja út fyri 8.750.000 milliónir komandi ár.

Av teimum verða átta milliónir brúktar til at byggja havnina út fyri.

Afturat tí koma 1,1 millión til vøggustovu, barnagrð og frítíðarskúlan.

## Fer at løna seg aftur

Jógvan Krosslá sigur, at tað er neyðugt at byggja havnina út, so at hon verður djúpari.

– Vit vera noydd at ganga krøvunum frá vinnulívinum á møti um eina djúphavn, tí havnin er so grunn, at tað tarnar virkseminum rættiliga nógv og verður onki gjørt, er vandi fyri, at vinnulívið fer av fjørðinum og tað kann kommunan ikki lata henda.

– Og skulu vit byggja út, mugu vit sjálvi útvega pengingin, tí fíggjarliga er kommunan er soleiðis fyri, at vit hava ikki loyvi at taka lán. Vit leggja eisini alstóran dent á at fáa skuldina niður so at vit fáa eitt størri, fíggjarligt frælsi. Samstundis er hetta er fyrsta veruliga útbyggingin, kommunan ger í nógv ár. Men hinvegin ivast borgarstjórin heldur ikki í, at tað fer at løna seg í longdini hjá vágbingum at kýta seg.

– Hóast tað verður eitt tungt tak, koma vágbingar at síggja ítøkilig úrslit av skattahækkingini, tí útbyggingarnar verða ein veldugur fyrimunur fyri vinnulívið og tey einstøku húskini.

Annars hevur verið upp á tal, at landskassin skuldi vera uppi í havnaútbygginginí í Vági. Løgtingið hevur samtykt, at Smyril skal sigla á Vág og í tí sambandi samtykti Løgtingið at vera við í havnabyggingini í Vági, so at ein samferðsluhavn kundi byggjast samstundis sum vinnuhavnin.

Men síðani er kinkur komin í og nú veit ongin, um landið verður við.

Men Jógvan Krosslá ger púra greitt, at Vágs Býráð fer at byggja djúhavnina, sama um landið er við ella ikki. Men verður almenna samferðsluhavnin ikki gjørd í sama viðfangi, verður útbyggingin sjálvsagt minni, enn upprunaliga ætlað.

– Sjálvandi vóna vit, at Løgtingið stendur við tað, sum er samtykt. Men loypir tingið frá, gera vit tað sjálvi, ongin ivi um tað, sigur hann.

Ætlanin er at byggja havnina út tey bæði næstu árini í 2003 og í 2004.

## 34 milliónir inn

Annars væntar Vágs Býráð, at 34 milliónir fara at koma inn í kommunuskatti komandi ár og tað er nakað meir enn í ár. Í ár komu 32,8 milliónir inn í skatti.

Fíggjarætlanin javnvigar við 43,5 milliónir, men tá er roknað við einum undirskoti upp á 2,7 milliónir.

Samstundis sum vágbingar hækka skattin, leggja teir stóran dent á, at betala rentur og avdrátt fyri at fáa skuldina niður, tí har er ikki ætlanin at slaka.

Næsta ár fer Vágs Kommuna at betala 3,4 milliónir í rentum og 7,6 milliónir í avdráttum.

Jógvan Krosslá sigur, at hetta ber í sær, at um trý ár, í 2005, fer kommunan bara at skylda eina álíkning og tá fær hon eitt heilt annað, fíggjarligt frælsi, enn hon hevur havt.





*Komið er væl áleiðis við arbeiðinum upp á ítróttarhøllina á Eiði. Hon er klødd innan við ljósum tilfari og kennist løtt og hugnalig at vera inni í*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Framdrift á Eiði

**Betrað verður um umstøðurnar fram við havnarlagnum á Eiði. Serliga er tað smábátarnar hugsað verður um, sigur borgarstjórin. Eisini aðrastaðni í bygdini er framdrift**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Streym- og vatnleiðingar verða settar upp fram við bryggjukantinum á Eiði. Virkisbygningur er á veg á havnarlagnum. Fleiri bátar rógva út. Fólk byggja hús, og ítróttarhøllin er við at koma undir land.

– Tað er framdrift í bygdini, fegnast borgarastjórin í Eiðis Kommunu, Tordur Niclasen, um.

Tað hevur leingi verið ynski um at bøta um umstøðurnar hjá teimum, sum hava bátar liggjandi í havnini á Eiði. Eitt nú at lata teimum el og vatn. Og nú verður tað so gjørt, sigur borgarstjórin.

Fram við bryggjukantinum verða settar tíggjar talvur við el-stikkum og vatnkranum. El-stikkini verða fimm í tali í hvørjari talvu. Eitt til 380 volt og fýr til 220 volt.

– Tað er serliga, meðan várróðurin er norðanfyri, at nógvir bátar liggja við bryggju á Eiði, og fólk meira og minni býr umborð. Tá er tað ikki meira enn natúrligt, at vit lata teimum slíka tænastu, sigur Tordur Niclasen.

Men eisini útróðurin á Eiði er mentur seinnu tíðina. Fyri ikki so øgiliga langt síðan var at kalla bara ein bátur, sum róði meira ella minni fast út av Eiði. Nú eru fleiri komnir afturat, umframt at bátar aðrastaðni eisini leggja regluliga upp á Eiði, vísir borgarstjórin á.

Sunnanvert flótibrýrnar er planerað øki at seta eitt virki á. Tað er felagið Salmon Proteins, sum fer at byggja virki til reinsing av slógvi frá alifiski. Grundøkið er um at vera klárt. Grivið verður í løtuni fyri kloakk og øðrum leiðingum, sum bindast skulu í verandi skipan longri inni á havnarlagnum, sigur Tordur Niclasen.

Móttøkuhøllin, sum bygd varð fyri nøkrum árum síðan, stendur tó enn tóm, hóast onkrar samráðingar hava verið við áhugað felag um at leiga hana frá kommununi.

– Og tað má tað so verða til, sigur borgarstjórin, tí kommunan fer ikki at reka nakað virksemi í høllini, staðfestir hann.

Longri uppi í bygdini er eisini lív. Uppi í Kolli eru fýra grundstykki klár, har grivið verður út á onkrum teirra.

Og út eftir Gerðisgarðinum, vestan fyri skúlan og ítróttarhøllina, er ætlan um nýggja útstykking við 14 grundstykkjum. Ognarviðurskiftini eru ikki heilt komin upp á pláss enn, og samráðingar eru í løtuni um keyp av lendinum, sigur Tordur Niclasen. Men áhugin er stórur, og fyrispurningar eru um øll stykkini. Tvey kommunal vegaarbeiði eru eisni í gongd á Eiði.

Avgerð er tikin um vetrarfriðing, sigur Tordur Niclasen, men tað praktiska í tí sambandinum er enn ikki komið upp á pláss. So sum hvar hegnast skal.

Eisini ítróttarhøllini gongur tað væl við, sigur borgarstjórin. Arbeitt verður fram í móti, at hon skal standa liðug til várs, og tað heldur borgarstjórin, at han kann lova. Tó vil hann ikki seta nakran dag á, tí várið er langt, sum hann sigur. Onkur hevur tó verið so bjartskygdur at siga, at hon verður liðug seinast í februar, tá Eiðis Bóltfelag, EB, fyllir 90 ár.

– Sjálvandi hevði tað verið heilt stuttligt og eitt upplagt høvi at tikið høllina í brúk, heldur tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði, men tað tori eg als ikki at lova.


